# Vanligar viðskiftatreytir í Betri Banka P/F

Vælkomin í Betri Banka.
Vanligu viðskiftatreytirnar eru galdandi fyri øll viðurskifti millum teg og Betri Banka, um ikki annað er avtalað í innlánsavtalu, útlánsavtalu (kredittavtalu), í goymslu- og handilstreytum fyri virðisbrøv, kortreglum, bokstreytum ella øðrum serligum treytum.

Betri Banki kann broyta vanligu viðskiftatreytirnar uttan fráboðan, um broytingarnar eru til tín fyrimun.
Eru broytingarnar ikki til tín fyrimun, skal Betri Banki boða tær frá 1 mánað framman undan, at broytingar og nýggjar ásetingar verða settar í gildi.

**Stovnan av kundaviðskifti**
Tá ið tú gerst kundi í Betri Banka, skalt tú útfylla eitt stovningarskjal, har tú millum annað skalt upplýsa navn, bústað og P-tal. Fyri at prógva upplýsingarnar, skal Betri Banki hava avrit av eitt nú passi, koyrikorti, dópsbrævi, navnabrævi ella P-talsváttan.
Er talan um einstaklingafyritøku, skal V-tal upplýsast. Betri Banki skal harafturat hava upplýsingar um, hvat kundaviðskiftið fevnir um.

Løgfrøðiligur persónur, eitt nú partafelag ella smápartafelag, skal upplýsa navn, bústað og V-tal umframt lata Betri Banka avrit av tekningarútskrift, viðtøkum, fulltrúum og seinasta roknskapi hjá felagnum.
Harumframt skulu nevnd, stjórn og fulltrúar hjá felagnum lata Betri Banka samleikaupplýsingar. Betri Banki skal eisini í hesum førum hava upplýsingar um, hvat kundaviðskiftið fevnir um.

Tú hevur bert loyvi til at brúka tínar privatu kontur, tíni privatu gjaldskort og aðrar privatar bankatænastur til privat endamál, og tínar vinnuligu kontur, tíni vinnuligu gjaldskort og aðrar vinnuligar bankatænastur til vinnulig endamál.

**Rættar upplýsingar**
Tú hevur skyldu til at lata Betri Banka tær upplýsingar um teg og títt kundaviðskifti, sum sambært lóggávu er álagt peningastovnum at innsavna, t.d. sambært skattalógini og hvítvasklógini.
Letur tú okkum ikki upplýsingarnar, kann Betri Banki uppsiga kundaviðskiftið við teg, sí "uppathald" niðanfyri.

Verður Betri Banki varugur við, at upplýsingar eru villeiðandi ella skeivar, rættar bankin tær.

Um Betri Banki roynir at seta seg í samband við teg uttan úrslit, kann bankin sperra tínar bankatænastur.

**Bústaðarbroyting**
Tú hevur skyldu til at boða Betri Banka frá, um tú broytir bústað.
Um tú flytur til, býrt ella ert uttanlands í longri tíðarskeið, er tað ikki vist, at Betri Banki fær bjóðað tær somu produktir og tænastur, sum vart tú búsitandi í Føroyum.

**Tagnarskylda**
Starvsfólk í Betri Banka hava tagnarskyldu um tíni viðurskifti og kunnu ikki uttan heimild geva øðrum upplýsingar, sum tey fáa um teg í sínum starvi í Betri Banka. Reglurnar fyri tagnarskyldu eru sambært lóg um fíggjarligt virksemi.

**Víðarigeving av persónupplýsingum**
Betri Banki er dátuábyrgdari fyri viðgerð av persónupplýsingum, sum fara fram í bankanum, og bankin tekur øll neyðug stig fyri at verja tínar persónupplýsingar í samsvari við galdandi dátuverndarlóg.

Tó hevur Betri Banki sambært lóggávu í summum førum skyldu ella rætt til at geva almennum myndugleikum persónupplýsingar

um teg.
Upplýsingar um tíni kundaviðurskifti eru t.d. navn, bústaður, P-tal, fíggjarlig viðurskifti v.m., og hesar upplýsingar kunnu latast almennum myndugleikunum, fyri at teir kunnu taka sær av umsitingarligum uppgávum.

Betri Banki kann harafturat biðja teg um samtykki til at lata upplýsingar um teg víðari, t.d. í sambandi við ráðgeving og marknaðarførslu. Tú kanst altíð broyta títt samtykkið ella taka tað aftur.

Tú hevur rætt til at biðja um at fáa at vita, hvørjar upplýsingar Betri Banki viðger um teg.

**Kæra um viðgerð av persónupplýsingum í Betri Banka**
Um tú ert ónøgd/ur við viðgerð av persónupplýsingum hjá Betri Banka, kanst tú seta teg í samband við ta deildina í bankanum, sum umsitur tíni kundaviðskifti. Tú kanst antin senda ein teldupost til banki@betri.fo ella ringja á 34 80 00.

Um tú ert ónøgd/ur við svarið frá tínari deild, kanst tú seta teg í samband við dátuverndarfólkið í Betri Banka. Tú kanst antin senda ein teldupost til persondata.banki@betri.fo ella ringja á 34 80 00 og spyrja eftir dátuverndarfólkinum.

Um tú ert ónøgd/ur við svarið frá dátuverndarfólkinum, kanst tú senda eina kæru til:

klaga.banki@betri.fo

ella

**Betri Banki P/F**
**Stjórnarskrivstovan**
**Yviri við Strond**
**Postboks 34**
**FO-110 Tórshavn.**

Um tú ert ónøgd/ur við úrslitið av kæruni, kanst tú seta teg í samband við Dátueftirlitið við at senda bræv til:

**Dátueftirlitið**
**Postboks 300**
**FO-110 Tórshavn.**

**Tekningarrættur og fulltrú**
Betri Banki skal kunnast um, hvør hevur heimild at undirskriva í kundaviðskiftum.
Tú kanst geva øðrum fulltrú at ráða tína vegna mótvegis Betri Banka. Fulltrúin skal vera skrivlig og skal vanliga gerast á serskildum oyðublaði frá Betri Banka.
Tann, sum fær fulltrú, skal lata Betri Banka avrit av samleikaupplýsingum, sí "stovnan av kundaviðskifti" omanfyri.
Fulltrúin hevur gildi, til Betri Banki fær skrivlig boð frá tær um, at tú tekur fulltrúina aftur ella vilt broyta fulltrúina.

Verður undirskrivingarheimildin broytt, skal Betri Banki somuleiðis hava skrivlig boð um broytingina. Um fulltrúarveitari andast, fella fulltrúir, sum fulltrúarveitari hevur veitt, burtur, tá ið Betri Banki fær boð um andlátið. Tað merkir samstundis, at Betri Banki sperrar kontur o.a. hjá fulltrúarveitara, til skiftirætturin hevur tikið støðu til, hvussu búgvið skal viðgerast.

Kundar kunnu í felag gera avtalu um felagskontu o.a., og hvør kontueigari kann ráða einsamallur yvir kontuni o.ø., uttan so, at annað er avtalað. Um ein av kontueigarunum andast, hevur Betri Banki kortini heimild til at steingja felagskontuna.

**Renta og provisjón**
Renta og provisjón fyri innláns- og útlánskontur eru broytiligar, uttan so, at annað er avtalað. At renta og provisjón eru broytiligar merkir, at Betri Banki altíð kann broyta rentu-og provisjónsstøði.

Rentu- og provisjónsstøði eru bundin av kontuslagi, eins og rentu- og provisjónsstøði fyri kontuna kunnu vera bundin av skiftandi saldu á kontuni.

Tú fært ella rindar rentu av innlánum, og rindar rentu av lánum og kredittum. At tú rindar rentu av innlánum vil siga, at Betri Banki eisini kann rokna negativa rentu av innlánum á tínum kontum.

Tú kanst fáa upplýsingar um rentu- og provisjónsstøði, undir hesum rentuspenni fyri vanligastu sløgini av inn- og útláni, á heimasíðuni hjá Betri Banka, www.betribanki.fo, ella við at seta teg í samband við bankan.

**Broyting av rentu- og provisjónsstøði**

Betri Banki kann uttan fráboðan broyta rentu- og provisjónsstøði, um broytingin er til tín fyrimun.

Betri Banki kann uttan fráboðan hækka rentustøði á innlánum og lækka rentu- og provisjónsstøði á útlánum, um

- inn- ella útlendskar broytingar í peninga- ella kredittpolitikki hava týdning fyri Betri Banka
- vanligt rentustøði ávirkast
- onnur broyting í vanligum rentustøði, t.d. á peninga- og lánsbrævamarknaðinum, hevur týdning fyri Betri Banka
- broytingar í skattum og avgjøldum hava týdning fyri Betri Banka.

Betri Banki kann lækka broytiligt rentustøði á innlánum og hækka broytiligt rentustøði á útlánum við at boða frá 14 dagar framman undan lækking ella hækking.
Betri Banki skal boða frá, um

- tey viðurskifti broytast, sum hvør sær vórðu løgd til grundar, tá tínar rentutreytir vórðu ásettar
- Betri Banki broytir sína heildarrentu og kostnaðaráseting av handilsligum orsøkum, uttan at tað hevur samband við gongdina í vanligum rentustøði.

Handilsligar orsøkir kunnu m.a. vera at røkka einari gagnligari tilfeingis- ella orkunýtslu hjá Betri Banka, at økja um vinning, marknaðarviðurskifti, t.d. kappingar- ella inntøkuviðurskifti, ella at broyta eitt ella fleiri kontusløg.
Tú fært kunning um møguligar broytingar í rentu- og provisjónsstøði á heimasíðuni hjá Betri Banka, www.betribanki.fo, umvegis Netbankan ella frá lýsingum í føroyskum fjølmiðlum.

**Rentuútrokning og rentudagar**

Betri Banki roknar dagliga rentur fyri hvørja einstaka kontu soleiðis:

- salda x áljóðandi rentu/360
- allir mánaðir í árinum verða roknaðir sum 30 dagar.

Tá ið dagliga saldan verður gjørd upp, tekur Betri Banki støði í rentudegnum fyri konturørslunum. Rentudagurin er, tá ið inngjald, útgjald ella onnur konturørsla fær gildi fyri útrokning av rentum á einari kontu.

Fylgjandi reglur eru nærum altíð galdandi:

- Tá tú rindar inn við reiðum peningi á kontu í Betri Banka, er avgreiðsludagurin rentudagur.
- Tá tú móttekur útgjald í reiðum peningi ella við korti av tínari kontu í Betri Banka, er avgreiðsludagurin rentudagur.
- Tá tú tekur út við korti í sjálvtøku hjá Betri Banka, er úttøkudagurin rentudagur.
- Tá tú brúkar kort í elektroniskari skipan í handli, er dagurin, tá ið kortið verður brúkt, rentudagur.
- Tá tú flytur pening millum egnar kontur í Betri Banka, er avgreiðsludagurin rentudagur fyri báðar kontur.
- Tá tú fært løn o.a., er dagurin, tá upphæddin er á kontu, rentudagur.
- Tá tú fært vanliga peningaflyting frá kontu í øðrum peningastovni, er dagurin, tá flytingin er á tínari kontu, rentudagur.
- Betri Banki kann altíð og uttan fráboðan broyta reglurnar um rentuútrokning,

rentudagar og rentutilskriving.
- Leygardagar, sunnu- og halgidagar, flaggdagur, grundlógardagur, ólavsøkuaftan, ólavsøkudagur, jólaaftan og nýggjársaftan eru ikki avgreiðsludagar í Betri Banka.

**Rentutilskriving**
**Innlán:** Betri Banki tilskrivar vanliga rentu á innlán eina ferð hvønn ársfjórðing. Tað verður gjørt við at leggja dagligu rentuútrokningarnar saman, góðskriva ella skuldskriva tína kontu fyri rentur, provisjón og gjøld og tilskriva upphæddina á kontu. Rentutilskriving er býtt upp í rentu á kontustøði og rentu á kundastøði.

**Renta á kontustøði**
Allar kontur hava eina ásetta rentu á kontustøði. Rentan verður tilskrivað kontuna. Fyrsti avgreiðsludagur eftir rentutilskrivingina er rentudagur.

**Renta á kundastøði**
Á flestu innlánskontum hjá privatkundum verður innistandandi rentað á kundastøði. Tað merkir, at dagliga rentuútrokningin tekur hædd fyri samlaðum innláni á hesum kontum og tilskrivar upphæddina á eina ávísa innlánskontu, sum er skrásett sum sumrentukonta. Sama um innlánsrentan er positiv ella negativ, verður hon sostatt roknað á innistandandi sum heild.

**Útlán**: Vanliga tilskrivar Betri Banki rentur á útlán eina ferð hvønn ársfjórðing ella hálva hvørt ár. Rentuskeiðið sæst á lánsskjalinum.

Rentutilskrivingin fer fram við at leggja dagligu rentuútrokningarnar saman og góðskriva ella skuldskriva tínar kontur fyri rentur, provisjón og kostnaðir.

Dagurin, tá renturnar verða tilskrivaðar, er rentudagur. Tilskriving av rentum sæst á kontuavriti ella aðrari uppgerð

Betri Banki kann gera av, at rentuupphædd undir ávísa stødd ikki verður tilskrivað.

Tá ein konta verður uppgjørd, verður renta tilskrivað í sambandi við uppgerðina.

**Tænastugjøld**
Betri Banki kann taka gjald fyri at veita tær tænastur. Bankin kann harafturat taka tænastugjald fyri at svara spurningum frá almennum myndugleikum.

Tænastugjøld verða annaðhvørt kravd sum føst upphædd, prosentáseting ella tímaáseting, alt eftir hvussu umfatandi veitingin er. Útrokningarhættirnir kunnu samansetast.

Vanlig tænastugjøld síggjast á einum kostnaðarlista, sum tú finnur á heimasíðuni hjá Betri Banka. Tú kanst fáa upplýsingar um onnur tænastugjøld við at seta teg í samband við bankan.

**Gjaldsbroytingar**
Betri Banki kann uttan fráboðan lækka tænastugjøld.

Vanlig tænastugjøld, sum eru partur av galdandi sáttmálaviðurskiftum, kann Betri Banki hækka við at boða frá 1 mánað frammanundan, um tey viðurskifti broytast, sum hvør sær vórðu løgd til grundar, tá tínar gjaldstreytir vórðu ásettar.

Betri Banki kann broyta vanliga gjaldsbygnaðin og gjaldsásetingina av handilsligum orsøkum.

Í galdandi sáttmálaviðurskiftum kann Betri Banki av handilsligum orsøkum taka gjald fyri tænastur, sum bankin ikki áður hevur tikið gjald fyri.
Tænastugjøld kunnu setast í verk við at boða frá 1 mánað frammanundan.

Betri Banki kann uttan fráboðan seta í verk og hækka tænastugjøld fyri einstakar tænastuveitingar og sum heild fyri nýggjar avtalur.

Tú fært kunning um gjaldsbroytingar á heimasíðuni hjá Betri Banka, við brævi ella frá lýsing í føroyskum fjølmiðlum.

**Trotarenta, áminningargjald o.a.**
Um tín konta er í troti ella eftirstøðu, kann Betri Banki krevja trotarentu, provisjón ella morarentu og kostnað fyri at senda áminningarskriv. Betri Banki kann eisini krevja, at tú rindar fyri møguligar útreiðslur, sum standast av løgfrøðiligari hjálp í sambandi við innkrevjing o.a.

Upphædd á áminningargjaldi sæst á áminningarskrivi frá Betri Banka.

Trotarenta og provisjón verða ásettar sambært meting hjá Betri Banka í mun til váðan av ítøkiligum mishildnum krøvum og mishildnum krøvum sum heild.

Betri Banki kann roknskaparliga velja at steðga rentutilskriving. Hetta merkir ikki, at Betri Banki hevur fráskrivað sær rættin til at renturokna kravið og annars krevja kostnað fyri áminningarskriv, útreiðslur o.a., ið seinni er lagt afturat í sambandi við innheintan av skuld.

Tú kanst fáa nærri kunning um trotarenta o.a. við at seta teg í samband við Betri Banka.

**Inngjald og úttøka**
Øll inngjøld á tínari kontu, sum ikki eru í reiðum peningi, fara fram við tí fyrivarni, at Betri Banki fær upphæddina.
Fyrivarnið er galdandi, hóast tað ikki er nevnt í kvittan ella aðrari fráboðan um inngjaldið.

Betri Banki kann flyta upphædd aftur, sum eyðsæð er sett á tína kontu av misgáum, t.d. um sama upphædd er sett á kontu tvær ferðir. Sama er galdandi, um so er, at Betri Banki, sambært avtalu við aðrar føroyskar peningastovnar, hevur bundið seg til at flyta upphædd aftur, sum er sett inn á tína kontu av misgáum.

Um peningur verður tikin av tínari kontu, boðar Betri Banki tær frá.

Eitt og hvørt inngjald til lán ella kreditt verður fyrst brúkt til rentu og provisjón. Hetta er galdandi, sama um tú sjálv/ur rindar, ella inngjøldini stava frá borgsmanni ella veðsetara. Onnur inngjøld verða síðan nýtt til at rinda avdráttir.

Betri Banki hevur rætt til, men ikki skyldu til, at hækka avdráttir ella gjøld til lán v.m. samsvarandi hækkandi rentustøði, ómaksløn ella tílíkum.

Tú hevur skyldu til at kanna so hvørt, um rørslur eru á tínum kontum, sum tú ikki kennist við. Um tílíkar rørslur eru, eigur tú alt fyri eitt at seta teg í samband við Betri Banka.

Yvirlit frá skrásetingum hjá Betri Banka, eitt nú kontuyvirlit, eiga altíð at metast sum nøktandi prógv fyri skuldarupphædd.

**Uppathald**
Tú og Betri Banki kunnu altíð og uttan freist enda kundaviðskiftið tykkara millum.

Tá ið kundaviðskiftið endar, kann Betri Banki uppsiga lán, kredittir, ábyrgdir og borganir, sum Betri Banki hevur veitt, og loysa seg frá øðrum skyldum, so sum skyldum í útlendskum gjaldoyra, sum bankin kann hava átikið sær fyri teg.

Tú hevur skyldu til at loysa Betri Banka frá øllum skyldum, sum Betri Banki hevur átikið sær tína vegna, og veita trygd fyri skyldunum, um Betri Banki metir tað vera neyðugt.

Betri Banki kann uttan ávaring slíta kundaviðskifti í m.a. hesum førum:

- um tú ikki hevur latið Betri Banka tær upplýsingar, sum Betri Banki metir vera neyðugar at innheinta um teg og títt kundaviðskifti sambært hvítvasklógini
- um tú letur Betri Banka skeivar upplýsingar
- um tú ikki í nóg stóran mun kanst skjalprógva upprunan til tína ogn
- um tú brúkar privata kontu til vinnuligt virksemi ella vinnuliga kontu til privat endamál
- um Betri Banki metir tað vera sannlíkt, at tú, beinleiðis ella óbeinleiðis, verður raktur av revsiatgerðum, ið eru ásettar/givnar av ES, ST ella øðrum myndugleika, her ímillum OFAC.

**Mótrokning**
Betri Banki kann, uttan at boða tær frá, mótrokna eina og hvørja áogn, gjaldkomna sum ógjaldkomna, ímóti tær, í einari og hvørjari áogn, bæði í donskum krónum og útlendskum gjaldoyra, sum tú hevur ella fært móti Betri Banka.

**Endurgjaldsskylda**
Betri Banki hevur endurgjaldsskyldu, um Betri Banki vegna mistak, vanrøkt, seinkan ella ófullfíggjaðari gerð ikki heldur avtalaðar skyldur.

Á teimum økjum, har strangari ábyrgd er galdandi, hevur Betri Banki ikki ábyrgd av tapi, sum stendst av:

- sliti í ella vantandi atgongd til KT-skipanir ella skaða í upplýsingum í hesum skipanum, sum kunnu vísast til omanfyri nevndu hendingar, sama um tað er Betri Banki sjálvur ella ein útvegari uttanífrá, ið rekur skipanirnar
- breki í streymveiting ella telesamskifti hjá bankanum, lógarinntrivi ella fyrisitingargerðum, náttúruvanlukkum, kríggi, uppreistri, borgarligum ófriði, herverki, yvirgangi ella valdsgerðum (undir hesum telduvirus og teldusníking)
- verkfalli, verkbanni, handilsbanni ella stongsli, sama um ósemjan er beind ímóti ella sett í verk av Betri Banka sjálvum, fakfeløgum ella øðrum felagsskapum, og uttan mun til hvør orsøkin til ósemjuna er. Sama er galdandi, tá ósemjan einans rakar ein part av bankanum.
- øðrum umstøðum, sum eru uttan fyri ávirkan hjá bankanum.

Betri Banki hevur ábyrgd av tapi, um bankin, tá avtalan varð gjørd, átti at sæð viðurskifti fyri sær, sum førdu til tapið. Sama er galdandi, um bankin átti at komið sær undan orsøkini til tapið.

Betri Banki hevur somuleiðis ábyrgd av tapi, um lóggávan undir øllum umstøðum ábyrgdar bankan fyri tey viðurskifti, sum hava leitt til tapið.

**Kundasamskifti**
Betri Banki skilar sær rætt til at geva kundum allar upplýsingar í elektroniskum líki, hóast tað í skjølum, handilstreytum, reglugerðum o.s.fr. verða nýtt orð sum "skrivliga", "bræv", "kontuavrit", "yvirlit" o.l.

Tú fært allar fráboðanir, kontuavrit, ársuppgerðir, møgulig áminningarskriv, notur og annað umvegis Betri Netbankan.

Betri Banki skilar sær tó rætt til at nýta vanligan post, um umstøðurnar krevja tað. Hevur tú ikki Betri Netbanka verða nevndu avrit send sum vanligur postur.

**Bandaðar telefonsamrøður**
Fyri at tryggja starvsfólkum og kundum móti møguligum misfatanum og fyri at veita vissu fyri, at skjalprógv hjá Betri Banka eru í lagi, tá Betri Banki ráðgevur um t.d. virðisbræva- og gjaldoyrahandil, kann Betri Banki banda telefonsamrøður.

**Kunngerð um góðan sið fyri fíggjarligt virksemi**
Betri Banki er fevndur av "Bekendtgørelse for Færøerne om god skik for finansielle virksomheder".

Kunngerðin er galdandi fyri virksemi hjá Betri Banka við atliti at privatkundaviðskiftum, men eisini við atliti at vinnukundaviðskiftum, um so er, at hesi ikki víkja munandi frá privatkundaviðskiftum.

Betri Banki fær í summum førum provisjón ella aðra samsýning, tá víst verður til samstarvsfelaga, ella tá tænastur verða seldar hjá samstarvsfelaga. Upplýsingar um samstarvsfelagar síggjast á heimasíðuni hjá bankanum, www.betribanki.fo.

Tú kanst lesa kunngerðina um góðan sið í lógasavninum á heimasíðuni hjá Fíggjareftirlitinum, www.finanstilsynet.dk.

**Trygdargrunnurin fyri innskjótarar og íleggjarar**
Umvegis Trygdargrunnin fyri innskjótarar og íleggjarar, eru kundar hjá Betri Banka í ávísan mun tryggjaðir móti tapi, um bankin fer á húsagang. Trygdargrunnurin svarar m.a. fyri navnamerktum innláni í Betri Banka við upp til 100.000 euro fyri hvønn innsetara. Trygdargrunnurin svarar uttan avmarking fyri pensjónskontum.

Trygdargrunnurin svarar fyri upphædd, sum svarar til 20.000 euro, um kundi, sum íleggjari, hevur hall, tí at Betri Banki ikki fær latið kundanum virðisbrøv aftur, sum eru í varðveitslu hjá ella verða umsitin í bankanum.

Tú kanst fáa nærri kunning um Trygdargrunnin á heimasíðuni hjá Finansiel Stabilitet, www.fs.dk.

**Kæra**
Um tú ætlar at kæra Betri Banka, verður tú í fyrsta umfari biðin um seta teg í samband við ta deildina í bankanum, sum umsitur tíni kundaviðskifti.

Um tú eftir hetta framvegis ert ónøgd/ur við viðgerðina hjá bankanum, kanst tú seta teg í samband við Stjórnarskrivstovuna, sum hevur ábyrgd av kærum, við at senda kæru til:

klaga.banki@betri.fo

ella

**Betri Banki P/F**
**Stjórnarskrivstovan**
**Yviri við Strond 2,**
**Postboks 34**
**FO-110 Tórshavn.**

**Fíggjarliga kærunevndin**
Um nøktandi loysn ikki finst millum Betri Banka og teg sum peningastovnskunda, kanst tú kæra til donsku fíggjarligu kærunevndina.
Avtalan er bert galdandi fyri kærumál hjá privatkundum. Kærunevndin viðger sostatt ikki kærur frá vinnukundum og parta- og smápartafeløgum.
Kæran skal viðvíkja einari ítøkiligari fíggjarligari trætu, sum hevur verið fyri kæruábyrgdara í viðkomandi peningastovni uttan loysn, og kravið skal vera íkomið eftir 1. januar 2011.
Kæran skal orðast á donskum.
Tú kanst fáa nærri kunning á og kæra umvegis heimasíðuna hjá fíggjarligu kærunevndini, www.fanke.dk, ella við at skriva til:

sek@fanke.dk

ella

**Sekretariatet for det finansielle ankenævn**
**St. Kongensgade 62, 2. sal**
**1264 København K.**

Telefon +45 35 43 63 33
Telefontíð kl. 10-12 danska tíð.

**Eftirlit**
Betri Banki er undir eftirliti av:

**Finanstilsynet**
**Århusgade 110**
**DK-2100**
**København Ø.**

Telefon +45 33 55 82 82.
www.finanstilsynet.dk.

**Nærri kunning**
Tú kanst fáa nærri kunning um Betri Banka á heimasíðuni hjá bankanum, www.betribanki.fo.

*Vanligu viðskiftatreytirnar eru seinast dagførdar í februar 2022.*